

*Dinnafía og beiggin Jógvan búðu hjá Onnu og Jóan Magnus har Niðri, tá Jógvan gekk at lesa og varð konfirmeraður í 1933. Anna var systir Líggjas Húsgarð*

okkum. Hetta var Anna Sofía, og hon segði, at Jóan Pauli var sjúkur. Ístaðin skuldu vit búgva hjá beiggja hennara.

So fóru vit øll fýra inn til Jóan Magnus har Niðri. Hann var ikki afturkomin av skipi, men teir vóru komnir á Skála, so hann fór at verða skjótur. Hann var nevniliga skipari hjá Absalon Jacobsen, sum var ættaður úr Syðrugøtu, men var fluttur til Skála. Anna og Jóan Magnus áttu tvær døtur. Onnur kallaðist Berlina, og var beint tá á hospitalinum. Hon var annars mamma nýggja blaðstjóran á Dimmalætting, Árna Gregersen. Hin var Katrina, hon var 5 ára gomul. Tað kann verða skoytt uppí, at tey fingu seinni ein son, sum kallaðist "Lítli Per". Tað var ikki tí, at hann var so lítil. Men hetta var fyri at skilja hann frá Per Gregersen, sum giftist við Berlinu, og sum var tann eldri av teimum báðum Perunum. Katrina giftist við Óla Gregersen, sum var beiggi m.o. Petru Gregersen, sum fylti 95 ár í februar, og sum eisini varð umrødd í Sosialinum.

Hjá Jóan Magnusi vóru eini vanliga stór hús, fýra kømur vóru á loftinum. Eg svav í øðrum kamarinum í øðrum endanum, og Inga og mamma hennara svóvu í einum øðrum kamari í einari song. Og beiggi mín svav í einum húsum niðanfyri hjá beiggja hennara, Petur Paula. Tey gingu so at lesa alla ta vikuna í kirkjuna í Norðragøtu. Hetta var ein heilt fittur teinur, um hálvur tími til gongu hvønn vegin. At fara við bili var ikki hugsingur um. Tað mundi ikki vera meira enn ein bilur í Gøtu tá, hjá Poul Christoffur. Teir vóru nokk so nógvir konfirmantar.

Í Gøtu var ógvuliga gott at vera. Tann dagin, vit fara úr kirkjuni, tá tey vóru konfirmerað, fóru konfirmantarnir at geva prestinum pengar, har hann búði í Norðragøtu. Tað hevur verið í Jákupsstovu, sum var granni hjá kirkjuni. Tann dagin var pápi John, Jógvan hjá Klæminti, komin at vera við til konfirmatiónina.

## Minnist framvegis mynd 73 ár aftaná!

Tá siga hini gjáarfólkini, at tey skuldu fara inn til eina konu, sum tey vóru í slekt við. Tá fara vit inn í Tjørnustovu, sum er beint við kirkjuna, og er hetta hjá langommu og -abba tínum (t.v.s. tí sum skrivar hesa frásøgn), sum vóru Petra og Absalon, og sum bæði vóru inni. Petra var ættað úr Barbustovu í Syðrugøtu og verður í einum seinni parti greitt frá sambandinum millum Gjógv og Barbustovu.

Petra vildi vera blíð, men vit vildu einki hava. Har inni var eisini ein nokk so ungur maður, sum var elsti sonur teirra. Hann æt Óla Jákup og var einkjumaður. Óla Jákup var eisini so grúiliga blíður. Hann vísti okkum bílæt av konu síni, sum hekk á vegginum. Hon var ein so vøkur kona, og var deyð ung í 1917, 24 ára gomul, beint eftir at hava fingið seinna sonin. Hon hevði fingið lungnabruna, sum einki var fyri tá í tíðini.

*Tað stuttliga hjá tí, sum skrivar hetta er, at henda myndin, sum Dinnafía minnist frá 1933 framvegis hongur í Tjørnustovu, og hon er sum tað skilst av ommu míni.*

So bjóðaði Petra okkum mjólk, og tað vildu vit so hava.

Eg minnist, at Petra segði, og tey høvdu lænt stólarnar í húsinum út til barsil. Milja, systir Óla Jákup, var gift við Elias Martin (Tvørfoss) hjá Marsonnu og Langa Petur Hansi, og tey høvdu lænt stólarnar til gestirnar. Barnið, sum varð doypt, var dóttir teirra Ólfríða, sum giftist yvir á Strendur. Hon verður 74 ár á ólavsøku.

## Í dans

Vit fara so yvir til Syðrugøtu aftur. Sunnukvøldið fara vit inn til Magninu og Dánjal í Beitinum. Har var ein genta í hinum húsinum, hon æt Mia. Húsini vóru áføst. Anna, kona Jóan Magnus, har vit gistu, var systir Líggjas bónda. Tey høvdu biðið hana fara í dans við mær í dansistovuni. So fór eg í føroyskan dans við hesi Miu. Tað var nokk so stuttligt.

Onkur drongur lá framvið, men eg var longu forlovað tá, hóast eg bert var 16 ár. Hetta var sjálvsagt sera ungt, men var eisini mest sum í loynd. Foreldrini vistu av ongum, og vit komu bert saman á kvøldi. Men heilt loyniligt kann slíkt ikki vera, og tey yngru systkini mundu slatra heim. Men hetta dámdi teimum gomlu bara væl. Tey kendu jú drongin, og høvdu alt gott at siga um hann.

## Langur vegur til Gjáar

Men til Gjáar kundu vit ikki fara fyrr enn dagin eftir. Hetta var jú um heystið, og dagurin var ikki so langur. Tað var jú ikki nøkur stutt ferð úr Gøtu til Gjáar tá í tíðini.

Morgunin eftir fara vit avstað. Tá fara vit við bili til Skipanesar. Síðan fara vit við einum báti við fjallmonnum og verða førd inn í Skálabotn. So ganga vit Millum Fjarða til Funningsfjørð. Har fara vit inn til eini hjún frá Gjógv, sum vóru flutt í Funningsfjørð. Her spyrja vit, um tað kundi bera til at fáa ein bát at føra okkum til Funnings. Her fingu vit kaku og drekka, og at fáa bát var lagamanni.

Jú, Akku skuldi føra okkum. Eg minnist kortini ikki, um hann førdi okkum til Húsarætt ella allan vegin til Funnings, og so gingu vit til Gjáar. So trupult var tað at ferðast tá í tíðini.

Annars var púra einki gjørt burtur úr konfirmatión tá í tíðini sammett við í dag. Tað mesta kundi vera ein drekkamuður við einum køkubita, og gávur var einki sum æt.

## Nógvir fiskimenn við Gjógv

Tá vóru nógvir fiskimenn við Gjógv. Okkurt árið mynstraðu millum 60 og 70 fiskimenn. Í dag kunnu teir teljast á aðrari hondini.

Tá menninir vóru burtur var tómligt og rúmligt í bygdini. Tá fóru børnini at spæla og renna um allan bøin. Tá tímdu børnini at renna og spæla, nú tíma tey nóg illa til gongu.

## Útróður og fiskaarbeiði

Í mínum ungdómi var útróðurin við Gjógv upp á tað mesta. Hesin var tó mestur um veturin, tá skipsmenninir vóru heima. Á sumri vóru tó eisini heimamenn, sum róðu út. Gjógv liggur jú soleiðis fyri, at teir róðu upp á seg stutt.

Tað plagdu fast at vera 6 áttamannafør, sum róðu út, og sum heitið sigur vóru 48 mans við hesum bátum.

Her var eisini veruliga talan um róður. Fyrstu 14 árini Jógvan Sofus róði út, var tað bara við árum sum greitt verður frá seinni.

Handlarnir í bygdini keyptu fiskin fyri 5 oyra pundið, og varð hann flaktur til saltfisk. Eg minnist, at tá vit komu til morgunmatar, plagdi stór fiskarúgva at liggja fyri handilsdurunum hjá Petur Kristiani og eisini hjá Sofusi. Í mínari tíð varð útróðrarfiskur ikki virkaður til klippfisk. Hetta var bert gjørt við skipsfisk.

Fiskaarbeiðið skapti heilt nógv arbeiði til heimafólkið. Tað vóru fleiri konur, sum vaskaðu fisk. Tær vaskaðu hann í hyljum og í ánni, sum var vanligt tá. Hetta hevði neyvan verið góðkent av Heilsufrøðisligu Starvsstovuni í dag!

Í einum seinni parti kemur Jógvan Sofus at greiða meira frá um útróður.



*Johanna og Sofus Debus høvdu telefonina. Tískil var tað tunga skyldan hjá Sofusi at ganga við deyðsboðum, og tað gjørdi hann eisini, tá boðini komu um Acorn. Tí var tað sera ófrættakent at síggja Sofus ganga ørindini við bláari húgvu, sum annars bert vórðu nýttar til jarðarferðir*



*Gamli parturin av Norðragøtu. Kirkjan er fremst á myndini.*
*Næst kirkjuni sæst Pershús, næst teimum Jákupsstova, har prestur helt til. Omanfyri vegin sæst fremst Glyvra-Hanusarhús. Hiðani var Hans J. Havstreym, umrøddur í seinastu Miðviku, ættaður. Síðan er tað Blásastova, sum nú er bygdarsavn. Næst henni hjá Ísaki, og so kemur Tjørnustova, har gjáarfólkini fóru inn á gólvið at vitja skyldfólkini.*